# Fyrireika seg til sjólívið

**Teir, sum velja sær eitt lívsstarv á sjónum, verða ikki púra blankir, fyrstu ferð teir stíga á skipsdekk, tó at einstakir av teimum hava verið onkran túrin**

TVØROYRI/HVALBA
*Áki Bertholdsen*

Tað skerst ikki burtur, at hjá summum næmingum er skúlagongdin ein pínsla. Og yvirhøvur munnu heldur ikki allar lærugreinar tykjast næmingunum líka spennandi.

Men so 10. flokkur á Tvøroyri møtir serliga væl upp í einari lærugrein.

Í alt ár hava 16 næmingar í 10. flokki á Tvøroyri havt sjóvinnu sum sergrein og tað hevur verið ein lærugrein, sum hevur havt stóran áhuga, tí næmingunum dámar væl at sleppa burturúr dagligu skúlagongdini í eina tíð.

- Vit kunnu ikki siga annað enn at uppmøtingin er góð, sigur Sofus Strøm, ið saman við Páll Michelsen undirvísir teimum í sjóvinnu.

Ì 10. flokki á Tvøroyri kunnu næmingarnir velja ímillum tríggjar breytir, køk, hondarbeiðið og sjóvinnu

Sjóvinnubreytina valdu 16 næmingar, alt drongir.

- Hóast mørkini ímillum manfólkaarbeiði og konufólkaarbeiðið er við at kámast, hava ongar gentur valt sjóvinnuna, siga lærararnir.

Hetta er fyrstu ferð, at tey hava sjóvinnu á Tvøroyri, men royndin hevur hilnast væl. Næmingarnir hava sjóvinnu hvønn mikudag í seks tímar og hjá teimum er tað eisini ein stuttleiki at sleppa út úr skúlatovuni til at royna okkurt heilt annað.

- Endamálið við sjóvinnubreytini er at fyrireika næmingarnar til sjólívið, so at teir, sum velja sær lívsstarv á sjónum, skulu ikki standa púra blankir, fyrstu ferð, teir stíga á skipsdekk, antin teir so fara við trolara, ella við línubáti.

Tó skal sigast, at einstakir av drongjunum hava longu verið onkran túrin til skips.



*Her eru teir á trolvirkinum Berginum í Hvalba. Helgi Eidesgaard, fremri og Hallur Thomsen skera burturúr og reinsa buktirnar*

## Roynt mangt og hvat

Ímeðan næmingarnir hava havt sjóvinnu, hava teir roynt mangt og hvat.

Áðrenn teir komu á trolvirkið, hava teir arbeitt við línu og snellu, teir hava gjørt línu og snelludergur og teir hava lært at spleysa. Teir hava eisini verið í fjørðinum. Teir hava eisini skorið flak og kjálkar, sum teir so fóru til tey á køksbreytini við og so vóru teir við til at gera matin til og fingu hann til døgverða.

Teir hava eisini lært at sigla eftir kumpas og eftir tólum og teir hava lært um streym og teir hava verið á ymsum virkjum. Teir hava eisini lært, hvørji krøv verða sett til trygdarútgerð umboð á bátum.

- Hesar fýra mikudagarnar, har teir hava verið á Berginum, hava teir lært tað mest grundleggjandi arbeiði við troli.

Nú, teir verða lidnir á trolvirkinum, fara teir til Klaksvíkar á trygdarskeið og seinni aftur skulu teir á radioskeið.



*Her eru nakrir av næmingunum í 10. flokki á Tvøroyri, sum hava valt sær sjóvinnu avmyndaðir á trolvirkinum í Hvalba: Frá vinstru eru teir Brian Thomsen av Tvøroyri, Hallur Thomsen úr Froðba Tvøroyri, Michael Jespersen úr Froðba, Helgi Eidesgaard av Tvøroyri, Poul Eli Bærendsen av Tvøroyri, Marner Bech av Tvøroyri, Harry Thomsen úr Hvalba, Hilmar Sveinbjørnnsson úr Nesi í Hvalba, Kaj Andre Holm úr Hvalba, Hanus Tausen úr Hvalba og Magnus Berg úr Nesi í Hvalba*



# Keypt útróðrarbát úr Kanada

**Miðvingar fara í vár at rógva út við stórum glastrevjabáti, sum keyptur er úr Kanada. Bara skrokkurin er komin úr Kanada. Øll útgerðin er sett í bátin í Føroyum**

ÚTRÓÐUR
*Edvard Joensen*

**Miðvági:** Glastrevjabáturin Bøsdalafossur úr Miðvági er komin úr Kanada, haðani hann er keyptur brúktur. Báturin er bíligari enn líknandi bátar, sum fáast á okkara leiðum. Báturin er seks ára gamal. Væntandi fara tveir mans at rógva út við Bøsdalafossi.

Bøsdalafossur er 42 føtur langur og fýra metrar breiður. Hann hevur stóra maskinu. 220 hk, sum gera, at hann undir vanligari sigling gongur 17 míl.

Tað er Sonfinnur Ellefsen, skipari í Miðvági, sum hevur keypt bátin úr Kanada. Sonfinnur er skipari á kanadiskum rækjuskipi og kennir haðani hesar bátarnar, kanadiarar brúka til útróður.

Hesir bátarnir av tí slagnum, sum Bøsdalafossur er, verða í Kanada vanliga nýttir til at trola eftir rækjum við, eins og teir eisini verða nógv nýttir til hummaraveiðu við rúsum.

Teir eru væl innrættaðir við stórum, rúmligum dekki, og umstøðurnar annars hjá manningini eru góðar.

Bátarnir bera orð fyri at roynast væl. Teir eru langir og lágir, og liggja tí væl í sjónum.

Bøsdalafossur hevur fingið sjey nýggjar snellur ísettar í Miðvági. Tær eru frá Oilwind. Fyribils verður hann bara útgjørdur til snellufiskiskap. Annars er øll tann nautiska útgerðin sett í bátin í Føroyum.

Nú Bøsdalafossur er klárur til fiskiskap, stendur hann eigaranum í knøppum 800.000,- krónum.

Bøsdalafossur kemur í flotan fyri dekksbátin Marnu, sum verður løgd. Veiði- og fiskiloyvi verða flutt yvir til Bøsdalafoss.



*Bøsdalafossur, sum er størri enn vanligu glastrevjabátarnir, føroyingar plaga at nýta, er keyptur úr Kanada. Træbáturin Marna, sum sæst á myndini innan fyri Bøsdalafoss, verður tikin úr flotanum, og loyvini flutt yvir til nýggja bátin*

*Mynd: Edvard Joensen*


Sosialurin

**Fiskivinnublaðið 2002**

Í Sosialinum 13. mars verður stórt innlegg um fiskivinnuna. Tað fer at snúgva seg um okkara fiski-, ali- og sjóvinnu, bæði á sjógvi og landi.

Umframt vanligu útbreiðsluna verður Sosialurin hendan dagin eisini sendur øllum reiðaríum og skipsmanningum umframt at blaðið verður ókeypis at fáa á Fiskivinnuráðstevnuni "Kappingarføri og lønsemi hjá fiskivinnuni" sum Farec skipar fyri á Hotel Föroyum 15. mars. So útbreiðslan 13. mars verður nógv størri enn vanligt.

Tí heita vit á tykkum, sum selja/umboða skipsútgerð og útgerð til sjóvinnuna annars, um at lýsa í hesum blaðnum, so hendan útgávan gerst uppaftur meira áhugaverd.

Freistin fyri at fáa eina lýsing við er mánadagin 4. mars.

Hetta er eitt gott høvi at kunna viðskiftafólk tykkara um tað, tit selja/umboða og tær tænastur, tit veita innan høvuðsvinnuna.

Tær fyritøkur, sum ynskja at verða við, eru vælkomar at venda sær til okkum og fáa nærri upplýsingar.

Ringið til Sosialin 311820 og tosi við

Finnbjørg Nattestad
Marknaðardeildin
*finnbjørg@sosialurin.fo*



